**SUMBIAR KOMMUNA**
Postboks 72
Í Kerinum 27
FO - 970 Sumba

Tel. 298 37 03 44
Fax. 298 37 01 14
Far. 298 22 39 04

# Kommunustýrisskipan fyri Sumbiar Kommunu

**Kapittul I**

**Kommunustýrið**

**§ 1**: Kommunustýrið í Sumbiar Kommunu hevur 5 limir, ið verða valdir eftir kommunalu vallógini. (KSL. §4,stk2)

Stk. 2: Kommunustýrið ásetur nærri reglur um sína máls mannagongd í eini fundarskipan. (KSL. §5,4) Stk.

3: Kommunustýrið ásetur nærri reglur um starvsfólkaviðurskifti í eini starvs fólka skipan. (KSL. §5,4)

**§ 2**: Kommunustýrið velur ein borgarstjóra. Borgarstjórin fær í par tíðar starvi sínum samsýning ájavnt við ½ av 32. fl., stig 1, sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag landsins.
og ein vara borgarstjóra sum far 10% av borgarstjórans løn. (KSL. §6)

Stk. 2: Um borgarstjórin av eini ella aðrari orsøk hevur forfall, røkir varaborgarstjórin borgarstjórastarvið. Varir fráveran meira enn 2 mánaðir, skal bygdaráðið velja fyribils borgarstjóra í hansara stað við gildi, til fráveran heldur uppat.

**Kapittul II**

**Samsýningar**

**§ 3.** Árliga fasta samsýningin til einstøku kommunustýrislimirnir fyri tey í § 2, stk. 1 nevndu tiltøk, sbr. tó § 4, er treytað av íbúgvaratalinum í kommununi tann 1. januar í valárinum, tá avgerð sambært § 1 verður tikin.
*Stk. 2.* Árliga fasta samsýningin kann í mesta lagi verða henda:

1) 0-499 íbúgvar: 24 ferðir upphæddina í § 2, stk. 2, nr. 1,



Teldupost: sumba@sumba.fo
Heimasíða: http://www.sumba.fo

**SUMBIAR KOMMUNA**
Postboks 72
Í Kerinum 27
FO - 970 Sumba

Tel. 298 37 03 44
Fax. 298 37 01 14
Far. 298 22 39 04

*Onnur samsýning ella endurgjald*

**§ 4.** Umframt fasta samsýning kann samsýning verða latin eftir reglunum í § 2, stk. 2 fyri:

1)luttøku á øðrum fundum í sambandi við útinning av starvinum sum kommunalt valdur limur,
2)Skeið luttøku, sum bý- ella bygdar(r)ráðið hevur góðkent og
3)annað virksemi eftir umbøn frá bý- ella bygda(r)ráðnum ella eini fastari nevnd.
Stk. 2. Tiltakslimur fær samsýning sum bygdaráðslimir.

**Kapittul III**

**Borgarstjórin**

**§4**: Nærri reglur um virksemi borgarstjórans í samband við kommunustýris fundir verða ásettar í fundarskipanini.

**§5**: Borgarstjórin hevur dagligu leiðsluna av kommunalu fyrisitingini, samb. kapittul 4, -6 og -8 í kommunu stýrislógini.

Stk. 2: Borgarstjórin skal ansa eftir, at tey mál, ið krevja kommunustýris viðgerð, fáa tílíka viðgerð, og at neyðug ummæli verða fingin til vega.

Stk. 3: Borgarstjórin skal síggja til, at málini verða avgreitt uttan óneyðuga seinking. Borgarstjórin kann krevja allar upplýsingar um mál og máls avgreiðslu, sum er hjá nevndum og starvsfólkum.

Stk. 4: Borgarstjórin ansar eftir, at farið verður fram eftir samtyktum kommunustýrisins. Um borgastjórin verður varugur við, at tað ikki fyriliggur játtan fyri eini ætlan, veður málið at leggja fyri kommunustýrið.

**§ 6**: Borgarstjórin stjórnar fíggjarviðurskiftum og roknskaparhaldið kommunurnar, og hevur eftirlit við allari umsiting kommunurnar, ið hevur við peningalig og fyrisitingarlig viðurskifti at gera.

Stk. 2: Borgarstjórin ásetur nærri reglur um mannagongdir í eini bókhalds skipan, ið gjølla sýnir, hvussu kommunu ognin verður umsitin.



Teldupost: sumba@sumba.fo
Heimasíða: http://www.sumba.fo

**SUMBIAR KOMMUNA**
Postboks 72
Í Kerinum 27
FO - 970 Sumba

Tel. 298 37 03 44
Fax. 298 37 01 14
Far. 298 22 39 04

**§ 7**: Borgarstjórin skal gera uppskot til fíggjarætlan.

Stk. 2: Við hvørja upphædd í uppskotinum skal vera viðmerkt:

1)tann upphædd, ið verður skotin upp fyri komandi ár,

2)tann upphædd, ið er avsett fyri verandi fíggjarár og

3)tann upphædd, ið er inngoldin ella brúkt í farna fíggjarári.

Stk. 3: Viðmerkingar skulu vera við hvørja konto um undir hvørjum treytum upphæddin kann brúkast og hvør ið hevur ábyrgd av kontoini.

Stk. 4: Tær íleggingar- og fíggjarætlanir, ið borgarstjórin hevur gjørt, verða lagdar fram saman við uppskotinum til árs fíggjarætlanina. Við uppskotinum skulu eisini fylgja upplýsingar um tær fíggjarligu broytingar, sum kunnu væntast í komandi fíggjarári.

**§ 8**: Hevur borgarstjórin forfall, yvirtekur varaborgarstjórin uppgávurnar í samband við fundarleiðsluna og aðrar uppgávur, í tann mun borgarstjórin áleggur honum.

## Kapittul IV

## Onnur viðurskifti

**§ 9**:Kommunustýrislimur kann skrivliga heita á borgarstjóran um at fáa upplýsingar og teknisk hjálp í samband við fyrireiking til fundir.

Stk. 2: Borgarstjórin ansar eftir, at allir kommunustýrislimirnir fáa upplýsingarnar, sum eru útvegaði, samb. stk. 1.

**§10**:Beinleiðis atgongd til skjalagoymsluna er avmarkað til borgarstjóran og skrivaran.

Stk. 2: Borgarstjórin setur nærri reglur um mannagongdir viðvikandi journalskipanini.

**§11**: Grannskoðari hjá Sumbiar kommunu er Januar.



Teldupost: sumba@sumba.fo
Heimasíða: http://www.sumba.fo

**SUMBIAR KOMMUNA**
Postboks 72
Í Kerinum 27
FO - 970 Sumba

Tel. 298 37 03 44
Fax. 298 37 01 14
Far. 298 22 39 04

**§12**: Hesar viðtøkur fáa gildi tann 20.04.2013

Stk. 2: Uppskot til broytingar í hesum viðtøkum og uppískoyti skulu verða viðgjørd á tveimum kommunustýris fundum og skulu í minsta lagi vera 14 dagar millum hvønn fundin.

Soleiðis samtykt á kommunustýris fundi tann 05.02.2013 og 19.04.2013.

Eyðbjørn Thomsen, Borgarstjóri    Frits Poulsen, Varaborgarstjóri

Rúni Lisberg    Brinnleif Bech    Niclas Hentze



Teldupost: sumba@sumba.fo
Heimasíða: http://www.sumba.fo